



*Ein gamal oljuleki kann hava viðført, at olja var á klettunum, har sprongt var*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

# Oljuleki orsøk til spreingiskaðar

**Oljuleki hevur kanska viðført, at spreingingin í Sørvági gjørdist sterkari enn væntað. Arbeiðseftirlitið hevur sett fyribils spreingiforboð á økinum í Sørvági**

SPREINGING

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Fríggjadagin varð sprongt í Sørvági, og spreingingin var somikið ógvislig, at grót fleyg heilt oman til landingarmiðstøðina, sum tók stóran skaða. Leygardagin var aftur sprongt, og aftur hesaferð var spreingingin ov ógvislig. Hesaferð vóru tað fýra bilar, sum stóðu fyri skotum. Grót dat á bilarnar, og onkur bilur fórst so illa, at hann gjørdist vrak.

Málið liggur nú hjá Arbeiðseftirlitinum, sum hevur sett fyribils spreingiforboð á staðnum. Spreingimeistarnir verða avhoyrdir, men tað er eingin ákæra reist móti teimum.

Ein oljugoymsla er tætt við staðið, har spreingingin fór fram. Ein gamal oljuleki kann hava viðført, at olja var á klettunum, har sprongt var. Tað kann hava ført við sær, at spreingingin gjørdist ógvisligari enn ætlað.

Av arbeiðseftirlitinum frætta vit, at málið verður kannað í løtuni. Tey hava spurt seg fyri hjá nøkrum serfrøðingum í Norra, men teir eru ósamdir á máli, um oljulekin kann hava havt nakra ávirkan. Tað kann ikki avvísast, at oljulekin hevur økt um spreingiorkuna. Um oljudampur var har, so er tað væl møguligt, at hann hevur gjørt spreingingina sterkari, tí at oljudampur er sera eldfimur.

Um tað einans er væta, sum liggur á klettunum, so skuldi tað ikki havt nakra ávirkan. Men vit kunnu ikki avvísa tað kortini, siga tey frá Arbeiðseftirlitinum.

Starvsfólk til Mylnuna



Søkt verður eftir bakarasveini og lærlingi at arbeiða í Mylnuni. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara. Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

mylnan

Send umsóknina til:
Mylnan, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.